# Nýggj matstova á Sandi

**Heima á Sandi er ein nýggj matstova í umbúna. Hon skal halda til í ovaru hæddini í Ungmannafelagshúsi num og verður at byrja við bert opin um vikuskiftið**

MATSTOVA
*Edvard Joensen*

**Sandi:** Um einar fjúrtan dagar letur ein nýggj matstova upp Heima á Sandi. Ætlanin er í fyrsta umfari bert at hava opið um vikuskiftini, sigur annar av sigtakarunum, Fríði Nolsøe.

Hann hevur saman við Hera Jacobsen av Sandi tikið stig til hesa matstovuna, sum teir fara at hava í ovaru hæddini í ungmannafelagshúsinum.

Hetta, at teir hava leigað seg inn í ungmannafelagshúsini, kemst av, at teir í fyrsta umfari vilja síggja, hvørja undirtøku tiltakið fær, áðrenn farið veðru undir at gera stórar íløgur. Ungmannafelagshúsið hevur góðkendan køk, har er gott pláss, og tað liggur væl fyri í bygdini. Er lætt at finna, og parkeringpláss eru eisini.

Sjávandi skal okkurt gerast, áðrenn farið verður í gongd, sigur Fríði Nolsøe. Eitt nú skulu teir hava nýggj borð og stólar. Eina barr ætla teir at seta upp eisini, og onkrir leysir veggir ella skermar veðra settir millum borðini, so fólk fáa sitið eitt sindur fyri seg sjálvan.

Sjálvt rúmið fara teir ikki at gera nakað við soleiðis, sigur hann. Veggirnir eru úr timbri, og tað ger, at tað passar rímilgia væl við tann stílin, teir hava valt.

– Vit hava ætlað at gera tað eitt sindur soleiðis »cowboykent«, sigur Fríði Nolsøe.

Ætlanin er at hava bæði vanliga marsotvu og café í húsinum, sigur hann. Tað skal bera til at koma inn at eta ein góðan búff, eins og tað eisini skal bera til bara at keypa ein kaffimunn við onkrum afturvið.

Teir fara í frysta umfari at hava opið fríggjadag, leygardag og sunnudag. Fríggjadag verður latið upp klokkan 17.00. Hinar dagarnar verður latið fyrr upp.

Møguleiki er eisini at skipa fyri ymsum tiltøkum, har dansur kann verða knýttur at, sigur Fríði Nolsøe. Dansihøli er í niðaru hæddini á ungmannafelagshúsinum.



*Fríði Nolsøe fer í næstum sjálvur annar undir vikuskiftismatstovu Heima á Sandi. Sandoyggjarfólk hava leingið manglað eitt stað, har tey kunnu fara út at fáa sær ein betri bita, halda teir, sum nú fara at lata matstovu upp í Ungmannafelagshúsinum á Sandi*

*Mynd: Edvard Joensen*

Fríði Nolsøe sigur, eisini fer at bera til at fáa mat koyrdan heim til hús, um fólk ynskja tað.

Hann sigur, at tað, sum í grundini verður bíðað eftir nú, er at fáa endaligt svar upp á umsóknina um skeinkiloyvi. Tá tað er komið - væntandi játtandi - eru teir klárar at fara í gongd, sigur hann.

# Føroya Tele veitir tænastur til sjóvinnuna

**- Vit hava eina kreativa uppgávu við atliti til sjóvinnuna, og á fiskivinnuframsýningini, North Atlantic Fish Fair, fara vit eitt nú at kunna um okkara tænastur og leggja upp til framtíðar samstarv, sigur Aksel Haraldsen**

NAFF
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Føroya Tele er millum tær fyritøkur, sum verða við á altjóða fiskivinnuframsýningini, North Atlantic Fish Fair, sum letur upp klokkan 10 í morgun og varir til og við hósdagin.



*- Básurin hjá Føroya Tele á NAFF-framsýningini verður avgjørt verdur eina vitjan, sigur Aksel Haraldsen*

## Nýggjar tænastur

Aksel Haraldsen, leiðari fyri sølu av tænastum til vinnulívið, sigur, at Føroya Tele á NAFF-framsýningini serliga fer at leggja seg eftir at kunna um tær tænastur, sum fyritøkan hevur at bjóða sjóvinnuni.

- Vit hava eina kreativa uppgávu við atliti til sjóvinnuna, og á fiskivinnuframsýningini fara vit at kunna um okkara nýggju tænastur og leggja upp til framtíðar samstarv.

Spurdur, hvat Føroya Tele serliga fer at leggja dent á, sigur Aksel, at tey ikki minst fara at kunna um tænastuna, har sjófólk kunnu hava atgongd til sín egna t-post umborð.

- Áður hevur tað verið soleiðis, at hevur skipið havt t-post, so hevur hetta verið ein felags t-postur. Nýggja tænastan ger, at sjófólk nú kunnu hava sín egna t-post, sum bert kann lesast við eini pin-kotu.

Aksel sigur, at ein fyrimunur við hesi nýggju tænastu er, at tá ið sjófólk fara umborð á onnur skip, kunnu tey fáa adressuna við sær.

## Nýtslan á teldu

- Aðrir fyrimunir, sigur Aksel Haraldsen, eru, at nýggja skipanin altíð velir bíligasta veg at senda, og at avrokningin fyri nýtslu sum nevnt kann gerast frá eini heimasíðu. Hetta merkir, at neyðugt er ikki hjá reiða-rínum at bíða eftir internetnýtsluni hjá manningini, eitt nú fyri at avrokna fyri túr.

Í eina tíð hevur verið gjørligt at avrokna fyri telefonnýtslu umborð eftir skipanini hjá Føroya Tele.

- Nú ber til at knýta Tel-Log saman við Sjóposti soleiðis, at til ber at síggja telefon-og internetnýtsluna á heimasíðuni. Hetta fer at lætta nógv um hjá reiðaríunum og eisini tryggja, at allar samrøður, sum verða førdar, eru við í yvirlitinum.

Aksel Haraldsen vísir á, at Føroya Tele fer at koma við uppaftur fleiri tænastum sum frá líður.

- Tí verður básurin hjá okkum avgjørt verdur eina vitjan á fiskivinnuframsýningini, leggur hann aftrat.

# Kjak um føroyska grundlóg í miðalhúsinum í Vágsbotni

TÍÐINDASKRIV

Havnar framburðsfelag, valfelag hjá Fólkaflokkinum í Suðurstreymi skipar á krossmessu, 3 mai klokkan 19.30 fyri fundi um nýggja føroyska stjórnarskipan í miðalhúsinum í Vágsbotni.

Flaggdagin var eitt ár liðið síðani grundlógarnevndin lat frá sær fyrra flaggdagsálitið - eitt álit við við uppskotið til føroyska grundlóg, sum tey kalla stjórnarskipan Føroya. Uppskotið er í 100 §'um við ásetingum um ríkisstøðu Føroya og mannarættindi, sum í dag ikki eru at finna í stýrisskipanarlógini.

Harumframt hevur nevndin mælt til at broyta týðandi partar av galdandi stýrisskipan. Millum broytingarnar eru nýggjar ásetingar um fíggjarvaldið, landsstýrismannaábyrgd og tingskipan. Serliga í kjakinum um játtanarskipan hevur grundlógarnevndin lagt á heilt annan bógv enn verandi stýrisskipan.

Allir flokkar á tingi hava sagt seg taka undir við arbeiðnum hjá grundlógarnevndini, men ósemja hevur tó verið um navnið hjá nevndini og hesi nýggju lógini, sum skal avloysa stýrisskipanarlógina frá 1994.

Hóast politiska undirtøku, og hóast onki er frætt um at danir eru ímóti eini føroyskari stjórnarskipan, so hava fleiri føroyskir juristar sett seg ímóti henni, millum annað tí hon sigst stríða ímóti tingskipanini og tí at nevndin hevur brúkt nakrar søguligar orðingar, sum serliga er fallið einum ónevndum juristi fyri bróstið, at summir setningar byrja við orðinum "nú". Ein løgfrøðingur á løgtingsskrivstovuni segði, at uppskotið fór at vera avvíst í tinginum, meðan ein advokatur segði uppskotið vera í stríð við ríkisgrundlógina.

Havnar Framburðsfelag bjóðar tí til spennandi orrustu um arbeiðið hjá grundlógarnevndini, har fleiri týðandi spurningar verða spurdir: Treingir stýrisskipanarlógin til ábøtur? Ber tað til hjá føroyingum at hava egna grundlóg undir verandi ríkisstøðu? Skulu vit ansa eftir at danska grundlógin verður hildin, ella kunnu vit samtykkja okkara egnu fatan av støðuni? Skal lógarmálið vera juridiskt, norrønt ella nútíðarkent? Og ber tað til sum grundlógarnevndin skjýtur upp at fáa í lag tjóðskaparliga semju ímillum allar flokkar á tingi?

Í panelinum verða: Poul Michelsen, tingmaður og limur í grundlógarnevndini, Súsanna Danielsen, stjóri á løgtingsskrivstovuni, Jóannes Hansen, fyrv. limur í grundlógarnevndini og Kári á Rógvi, næstformaður í grundlógarnevndini.

Fundurin er almennur og øll eru vælkomin.


